


*Sámal Jacobsen, frá Føroya Banka, handaði Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingi, og hinum vinnarunum kekk frá Føroya Banka*

# Hans Andrias ársins kjakvirðisløn

**Grundgevingin hjá dómsnevndini at velja Hans Andrias Sølvará til ársins kjakvirðisløn, førd fram av Karin Kjølbro:**



*Karin Kjølbro, sosialráðgevi og fyrrverandi løgtingskvinna, var við í dómsnevndini, sum valdi ársins kjakvirðisløn*

Vit fýra, Jóannes Dalsgaard, Annleyg Lamhauge og Jón Brian Hvidtfelt, hava havt tann heiður at meta um, hvør skal hava ársins Kjakvirðisløn, og vit eru samd um at orða okkum soleiðis:

Torført er at siga nakað nýtt um demokratiið og fólkaræði, men tað, sum oftast verður víst á í hesum høpi, eru orðini hjá Voltaire, ið livdi í 18. øld, nevniliga: Eg eri ósamdur í øllum tú sigur, men til mín deyð vil eg berjast fyri tínum rætti at siga tað!

Meta vit fólkaræðisligu politisku skipanina, so vita vit, at meirilutin til eina og hvørja tíð ræður. Hetta kann manngan av minnilutanum kennast bæði beiskt og órættvíst. Tí er virðingin fyri sjónarmiðum annara so týdningarmikil í fólkaræðinum.

Hetta merkir, at vit ikki bert hava hømi og rætt til at kjakast, men at vit nýta henda rætt til at kjakast og finnast at, har vit halda tað vera verða neyðugt og hóskandi.

Tað merkir so aftur, at tað helst skulu vera grundgevingarnar, sum sigra, tá stórar og smáar avgerðir skulu takast eitt nú í politikki.

Fólkaræði er í verki ein prosess. Skal hon ikki stirvna í tómum ella ófruktbarum orðadráttum, krevst eitt støðugt og áhaldandi samfelagsorðaskifti.

Uttan eitt livandi, sakligt, breitt og fjølbroytt samfelagsorðaskifti verður fólkaræði ikki ein skipan, har øll kenna, at tey hava ávirkan, eru við, eru vird og eiga lut.

Flest øll munnu vera samd í hesum. Eisini munnu vit vera rættiliga samd um, at tað als ikki er so lætt og einfalt at taka lut í almennum samfelagsorðaskifti.

At varpa ljós á tabuevni, at finnast at máttmiklum stovnum og fyritøkum, at tala opið um átrúnaðarli viðurskifti, at vísa á trótandi javnrættindi, at v´sa formligar og óformligar valdsbygnaðir er mangan eins trupult og tað er neyðugt – ikki minst í lítla samfelagnum.

Tað er tí neyðugt, at tey, sum tora, vilja og hava gávurnar, verða stuðlað og fáa at vita, at vit eru mong, ið virðismeta avrik teirra í samfelagsorðaskiftinum.

Hans Andrias Sølvará er júst ein slíkur samfelagsdebattørur. Vit halda, at hann eigur at fáa kjakvirðisløn 2008, tí hann á djarvan, gløggan og greiðan hátt hevur víst á týdningin av einum opnum og erligum orðaskifti í samfelagnum, samstundis sum hann dugir at lurta.

Fyri egna rokning vil eg leggja aftrat, at tað. er hugaligt, at førleikin á hesum øki er so mikil hjá fólkum, ættað norðan úr myrkrinum. Hans Andrias hevur røtur í Múla. Hinumegin fjørðin gekk ein smádrongur fyri hundrað árum síðani. Hann gjørdist frægasti málmaður okkara og mætasti debatørur – í Varðanum longu í 1920-unum. Høvuðsæðrin í skrivingini hjá Kristiani Matras var heimbygdin og alheimurin.

Vit fýra hava gjølla grundgivið fyri avgerð okkara, ið verður lisin upp í sambandi við handanina, og tí verður hon ikki endurgivin her.

Eg fari at ynskja Hans Andriasi tillukku. Vit vænta, at hann verður ein góð fyrimynd í tí samfelagsorðaskifti, ið er so neyðug, og sum ivaleyst fer at menn-ast til gagns fyri fólkaræði og harvið okkum øll.



*Mia Káradóttir og Alvi Joensen spældu til handanina*

## Hans Andrias Sølvará í takkarrøðu síni:

Eg fari at siga stóra tøkk fyri hendan heiðurin. Takk til løgmann og til Karin og til Miðlahúsið fyri hetta tiltakið.

Eg má siga, at tað kom eitt sindur óvart á meg, tá Jan (Müller) ringdi til mín við boðunum um at eg skuldi fáa ársins kjakvirðisløn.

Tey evnini, sum eg havi blandað meg upp í, hava verið nokk so kontroversiell, kann man siga, men júst tí eri eg serliga glaður fyri hesa virðislønina. Tað er gott at vita, at onkur leggur til merkis tað, sum man ger.

Tað er altíð gott at kjakast; tað er við til at menna samfelagið og at flyta mørk, skapar rúm fyri øllum. Fólkaræði er ikki eitt fólkaræði uttan eina virkna kjakmentan, sum alla tíðina bjóðar teimum ráðandi sjónarmiðunum av. Tí eiga vit at leggja okkum eftir at kjakast um tey evni, sum veruliga hava nakran týdning fyri okkum.

Tað er ikki fyri at hava rætt, at man leggur seg út í kjak, men fyri at bjóða siðbundnu sjónarmiðunum av. At verða við at skapa eitt samfelag, har tær bestu grundgevingarnar sigra, og eitt samfelag, har tað er pláss fyri øllum.

Hetta hevur serligan týdning í samfelagnum í dag, sum manglar arbeiðsmegi, útbúgvin fólk, kvinnur, sum kunnu bera okkum longur fram á mál.

Allar kanningar benda á, at búskaparligur vøkstur er størstur í samfeløgum, sum hava virðing fyri øðrvísi eksistensum. Granskingar benda á, at samfeløg, sum hava flest moskur og flest samkynd hava størstu búskaparligu framgongdina. Við øðrum orðum er tað ikki bara moralskt rætt at bjóða siðbundnu sjónarmiðunum av, tað er eisini búskaparliga ógvuliga klókt. Og eg havi so bara roynt at givið mítt íkast til kjakið.

Enn einaferð stóra tøkk fyri viðurkenningina.